# gv í Finlandi

at vaksa um virksemið, jú vit valdu valdu tað seinra og tað eri eg glaður fyri í dag leggur Jákup afturat við einum smíli.
Vit gjørdu fyri tað mesta rørarbeiði og at instalera hita fyri fólk, sum bygdu ella skiftu gamla instalatión út við nýggja, men vit royndu eisini at selja útlenskar ketlar.
Vit gjørdu útlendskar ketlar uppá licens eina tíð, men tá ið verksmiðjan vit samstarvaðu við fór á húsagang, byrjaðu vit við okkara egnu ketlum, sigur Jákup Vit meta, at ketlarnir hjá Hógv eru bara blivnir betur og betur, og í 2004 avgjørdu vit at fáa hetta dokumenterað.
Fyri at gera hetta arbeiði so gott sum gjørligt, var avrátt, at senda ein av okkara ketlum niður til kanningarstovu í Danmark.
Teknologiskt Institut kannaði ketilin og góðu honum sera góð viðmæli og í dag eru ketlarnir hjá Hógv nevniliga CE góðkendir.
Vit fingu sera gott viðmælið og tá settu vit eisini fer á føroykst framleiddu ketlarnar, sigur Jákup.
Og Jákup kann sannliga gleðast, tí í hesum døgum er hann á ferð í Finlandi, har hann er í samráðingum við fleiri finskar bátaverksmiðjur, um at levera Hógv Marinu-ketlar.
Finlendingar eru eitt av heimsins stóstu framleiðarunum av stuttleika- bátum og bátum í støddini 27 til 39 fót, og tí hava vit sett okkum fyri, at fáa eitt



*Í hendan bátin settu Hógvfólkini ein føroyskan marinu-ketil.*

sindur av hesum marknaðinum til okkara bátaketlar ella Marinuketlar sum vit kalla teir. Bara her í Kokkulaumráðnum í Botnisku víkini eru tíggju verksmiðjur, so vit eru sera áhugaðir í hesum økið.
Jákup sigur, at hetta er ikki einasti útlenski marknaðurin Hógv hevur, tí nakað er selt til Ísland og Grønland, sigur hann.
Við einum marknaðarparti uppá 65 % á føroyska húsamarknaðinum og við einum væntandi útflutninginum eru vit komnir eitt stórt fet víðari á leiðini.
Jákup er málrættaður, eitt virkið uttan málsetning hevur onga framtíð, og okkara málsetningurin er, at Hógv skal náa at útflyta 30 % av síni framleiðslu og vit arbeiða hart við hesum, sigur Jákup.
Ì tøttum samstarvið við Shell, sum hevur leverað oljufýringina til sjálvan Hógv-marinuketlin, hava vit nú innstalerað fysta bátaketlin í ein bát á eini finskari bátaverksmiðju. Tíðin má vísa, um vit fáa sáttmálar upp at standa, men útlitini eru góð sigur Jákup.
Í dag eru vit vanliga 6-10 fólk í starvið hjá Hógv sigur hann, men kemur útflutningurini fyri seg, verður helst neyðugt við enn fleiri. Jákup sigur, at byggivirksemi í føroyum er eisini í hæddini í løtuni, so vit ríða helst á einum aldudali í løtuni.
Tað kemur helst tann tíð, tá vit skulu líta á vanligar umstøður og vónandi á útflutningin, sum vit nú leggja lunnar undir í løtuni, sigur Jákup Olsen at enda við Sosialin.




*Sosialurin í Finlandi*

## FAKTA

Hógv er stovnað sum P/F 1990
Stjóri Jálup Olsen
Størv 6 – 10

Nevndarlimir
Poli Jacobsen
Jákup Mørkøre
Kristian Martin Petersen
Jálup Olsen

Framleitt uml. 1400 ketlar til føroyska marknaðin higartil.
Virkisøkið vvs og rør.